## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig, men leygardagin kaldari.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt vátaslettingsælið. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í stívt andøvsgul millum landnyrðing og útnyrðing og sólglottar, men okkurt vátaslettingsella kavaælið. Hitin millum 2 og 5 stig. Týsdagin strúkur í vindi av landsynningi og regn. Lýggjari.

# Salsa í Havn

**Seinasta vikuskiftið í mánaðinum verður enn einaferð hildi skeið í vælumtókta Salsa-dansinum**

SALSADANSUR

Salsa er eitt slag av cubanskum pardansi, sum er sera lívligur, stuttligur og eksotiskur. Salsa verður dansað í nærum øllum heiminum og er sera væl umtókt í nógvum stórbýum, eitt nú London, Paris, Berlin, og Keypmannahavn. Einamest tí tað er so stuttligt og lívsjáttandi. Síðstu ferð salsaskeið var í Havn varð tað væl vitjað. Hetta var í juni mánaði í fjør, og vóru tá umleið 40 fólk á vikuskiftisskeiði, umframt at at eini 60 fólk høvdu leitað sær á Platform Mentanarnáttina, 4. juni, tá ókeypis undirvísing varð givin. Við stóra áhuganum í huga varð tá avgrjøt, at í øllum førum eitt skeið mátti haldast afturat, og verður hetta seinasta vikuskiftið í hesum mánaðinum.



*Um vikuskiftið fer Sara í Dali Hedeland at undirvísa í salsadansi í Kagganum í Havn. Í juni hevði hon eisini dansiskeið á Platformi. Nú ber til hjá teimum, ið royndu seg tá, at læra enn meira*

Undirvísararnir í juni vóru Sara í Dali Hedeland og Anh Duy Nguyen sum bæði eru von at undirvísa í Keypmannahavn.

Hesaferð kemur Sara einsamøll til Føroyar at undirvísa, men tað ger ikki skeiðið minni gott. Sum oftast er bert ein undirvísari í salsadansi. Sara er sera dugnalig og vælumtókt í salsaumhvørvinum í Keypmannahavn, sum er rættiliga stórt. Hon er bæði aktiv sum salsa-DJ á salsadiskotekunum og sum undirvísari. Eitt nú hevur hon í hálvttriðja ár staðið fyri salsakvøldi við undirvísing og dansi hvørt mánakvøld á Café Kellerdirk á Frederiksberg í Keypmannahavn. Umframt hetta tekur Sara eisini lut í salsa-showum av ymsum slag.

Í juni var eitt skeið fyri byrjarar. Hesaferð verða tvey skeið. Eitt fyri byrjarar og eitt fyri framhaldarar. Framhaldaraskeiðið er bæði fyri tey, sum vóru á skeið seinast, men eisini til tey, sum tað liggur væl fyra at dansa hjá. Og ikki minst til teirra, sum áður hava roynt seg í salsa-kynstrinum.



*Kenda modellin Heidi Klum og David Copperfiled vísa fram salsadans við World Music Awards í Las Vegas í september – jú, rætt er tað, salsadansur verður dansaður nógva staðni…*

Skeiðið hesaferð verður í Kagganum. Byrjarar fara at royna seg fríggjakvøldið og leygardagin, meðan framhaldarar fara at salsa seinni leygardagin og so sunnudagin.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 16 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 24 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 19 |
| New York | 12 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 978 hPa. yvir Írska Havinum fer móti Hetlandi og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




Lágtrýstið yvir Hetlandi fer í landnyrðing og grynnist. Vestan fyri lágtrýstið rekur kaldari luft av landnyrðingi og norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/10 kl. 06⁰⁰–20/10. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm –mált frá 19/10 kl. 06 ⁰⁰–20/10 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 98,0 mm

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan
N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

17. oktober: Mánin næstur jørðini
20. oktober: Fyrra kvarter
28. oktober: Fullmáni
2. novemb.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. okt | 02.51 | 15.17 | 01.51 | 14.17 | 02.06 | 14.32 | 04.51 | 17.17 | 05.51 | 18.17 | 01.06 | 13.32 | 00.06 | 12.32 | 03.06 | 15.32 | 04.06 | 16.32 | 02.36 | 15.02 | 03.51 | 16.17 |
| 23. okt | 03.44 | 16.09 | 02.44 | 15.09 | 02.59 | 15.24 | 05.44 | 18.09 | 06.44 | 19.09 | 01.59 | 14.24 | 00.59 | 13.24 | 03.59 | 16.24 | 04.59 | 17.24 | 03.29 | 15.54 | 04.44 | 17.09 |
| 24. okt | 04.34 | 16.56 | 03.34 | 15.56 | 03.49 | 16.11 | 06.34 | 18.56 | 07.34 | 19.56 | 02.49 | 15.11 | 01.49 | 14.11 | 04.49 | 17.11 | 05.49 | 18.11 | 04.19 | 16.41 | 05.34 | 17.56 |
| 25. okt | 05.18 | 17.39 | 04.18 | 16.39 | 04.33 | 16.54 | 07.18 | 19.39 | 08.18 | 20.39 | 03.33 | 15.54 | 02.33 | 14.54 | 05.33 | 17.54 | 06.33 | 18.54 | 05.03 | 17.24 | 06.18 | 18.39 |

5 707265 100050 >